## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Um morgunin lot av landsynningi og regn, men seinnapartin lot av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið Hvítusunnudag:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið 2. Hvítusunnudag:**
Fleyr til gul av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men eisini mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 12 og 16 stig.

# Klipp til løgregluna

**Ein løgreglubilur fekk stóran skaða, tá førarin eftir øllum at døma ikki helt fjarstøðuna til bilin, sum koyrdi frammanfyri**

FERÐSLUÓHAPP

Vakthavandi var ikki serliga tíðindafróður, tá Portalurin spurdi, hvat var hent, og segði seg ikki vita enn, hvat nágreiniliga er farið fram.

Men myndamaðurin hevði spurt annan av løgreglumonnunum og hann greiddi soleiðis frá:

- Teir vóru á veg norðureftir seinnapartin, tá bilurin, sum koyrdi frammanfyri bráðliga bremsaði. Førarin á løgreglubilinum koyrdi eftir øllum at døma ov nær bilinum frammanfyri, tí hann náddi ikki at steðga. Fyri ikki at renna upp í reyvina á jeepinum frammanfyri, snaraði løgreglubilurn uttan um, men tá kom ein bussur ímóti honum.

Førarin á løgreglubilinum royndi at snara inn aftur til høgru, men náddi tað ikki og rendi harvið í mótkoyrandi bussin.

Eins og myndin, sum Ólavur Frederiksen hevur tikið, vísir, fekk løgreglubilurin stóran skaða.

Sambært løgregluni skulu vitni avhoyrast, áðrenn tey kunnu siga nakað um, hvør hevði ábyrgdina av óhappinum.

Spurningurin er so bara, um førarin nú fær klipp í koyrikortið fyri ikki at halda fjarstøðuna til bilin frammanfyri.




*øgreglubilurin fekk rættiliga stóran skaða, tá hann rendi á ein mótkoyrandi bil*
*Mynd: Ólavur Frederiksen*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 1 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 11 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 23 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 9 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 14 |
| Kiev | 11 |
| Bukarest | 15 |
| Paris | 24 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 21 |
| Malorca | 25 |
| Athen | 18 |
| Malta | 20 |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 24 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 19 |
| New York | 21 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 25 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 17 |

### LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 998 hPa. vestan fyri Skotland fer í útnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygardagin.



**Í dag:**
Lágtrýstið norðan fyri Føroyar fer eystureftir. Hitabrúgvin vestan fyir Bretsku Oyggjunum kemur handa vegin og verður væntandi yvir Føroyum Hvítusunnudag

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 7/5 kl. 06⁰⁰ – 8/5 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,9°
Minsti hiti máldur í mai: -9,9° - Mesti hiti máldur í mai: 18,3°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 3/5 kl. 06⁰⁰ – 4/5 06⁰⁰.
Avfallið higartil í mai: 15 mm




Alt um harmonikur



www.simme.eu

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 5. mai | Tendring |
| 6. mai | Mánin næstur jørðini |
| 12. mai | Fyrra kvarter |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. mai | 9:50 | 22:22 | 8:50 | 21:22 | 9:05 | 21:37 | 11:50 | - | 0:19 | 12:50 | 8:05 | 20:37 | 7:05 | 19:37 | 10:05 | 22:37 | 11:05 | 23:37 | 9:35 | 22:07 | 10:50 | 23:22 |
| 9. mai | 10:52 | 23:22 | 9:52 | 22:22 | 10:07 | 22:37 | 0:22 | 12:52 | 1:22 | 13:52 | 9:07 | 21:37 | 8:07 | 20:37 | 11:07 | 23:37 | - | 12:07 | 10:37 | 23:07 | 11:52 | - |
| 10. mai | 11:49 | - | 10:49 | 23:16 | 11:04 | 23:31 | 1:22 | 13:49 | 2:22 | 14:49 | 10:04 | 22:31 | 9:04 | 21:31 | - | 12:04 | 0:37 | 13:04 | 11:34 | - | 0:22 | 12:49 |
| 11. mai | 0:16 | 12:41 | 11:41 | - | 11:56 | - | 2:16 | 14:41 | 3:16 | 15:41 | 10:56 | 23:21 | 9:56 | 22:21 | 0:31 | 12:56 | 1:31 | 13:56 | 0:01 | 12:26 | 1:16 | 13:41 |
| 12. mai | 1:06 | 13:43 | 0:06 | 12:43 | 0:21 | 12:58 | 3:06 | 15:43 | 4:06 | 16:43 | 11:58 | - | 10:58 | 23:35 | 1:21 | 13:58 | 2:21 | 14:58 | 0:51 | 13:28 | 2:06 | 14:43 |